# Akslayppini geva andsperru

HØGNI HOYDAL



**Nú er heldur reglan enn undantakið í føroyskum politikki at siga seg vera ímóti, men vera fyri kortini. Seinasta dømið er at vera ímóti Irak-krígnum, men loyva bumbuflogførum í føroyskt loftrúm – og so spæla at vera ímóti ólógligum fangaflutningi**

Eins og ein skógareldur breiðir seg ókeypis hyklið í føroyskum politikki: Ein er ímóti samgonguni, men atkvøður við henni og umboðar hana í formanssessi. Ein annar markerar seg við at vera ímóti skattalættum og ójavnaði, men atkvøður fyri og stuðlar tí samgongu, ið fremur ójavnan. Ein triði samtykkir yvirlýsingar at skipa fiskidagabanka, men atkvøður ímóti, tá uppskotið kemur. Ein fjórði er fyri umhvørvispolitikki, men er ímóti uppskotum, ið kunnu fremja hann. Ein fimti tosar um breiðar semjur og at taka avgerðir um framtíðina, men tekur ongar avgerðir og letur gamlan rossahandils- og áhugabólkapolitikk stýra øllum.

Hetta hava verið árini hjá skipaðu andsagnunum, har onki fær avleiðingar, og ongin verður settur til svars.

Og komandi árið sær longu út til at gerast tað stóra árið við ókeypis marketingum. Har politikarar senda ballónir upp í hópatali, sum teir sjálvir skjóta niður í verki.

Feskasta dømið fingu vit nú í Uttanlandsnevnd Løgtingsins. Somu politikarar, sum hava atkvøtt ímóti Irak-krígnum og mótmælt, at Føroyar gerast partur av hesum sorgarleiki, har 34.452 sivilfólk vórðu dripin í fjør, geva glaðbeintir sítt samtykki til, at amerikonsk flogfør nýta føroyskt loftrúm.

Onkur roynir síðani súmbolskt at mótmæla móti ólógligum fangaflutningi, tí tað hevur jú verið so nógv frammi alment. Sambært hesum, skulu fangar ikki flytast gjøgnum føroyskt loftrúm, men bumbur og vápn er í fínasta ordan. Bert ein mælti frá at geva loyvi – samsvarandi tí, ið Løgtingið hevur samtykt.

Samstundis royna somu politikarar at gykla fólki fyri, at eitt sonevnt Fámjins-skjal er trygdin fyri, at okkara loftrúm ikki verður misnýtt.

Teir vita eins væl og eg og tú, at um Uttanlandsnevndin tordi at siga nei og mótmæla, at okkara loftrúm verður nýtt til krígsendamál, so hevði danska stjórnin givið loyvi kortini. Og so var alt tosið um Fámjins-skjal og "ægte medinddragelse og indflydelse" avdúkað sum tað bluffið, tað er.

Tí er tað so nógv lættari at látast at vera ímóti, men vera fyri allíkavæl.

Úrslitið er, at líkasælan millum fólk breiðir seg eins skjótt og talið av ókeypis andsagnum. Akslayppini geva eftirhondini andsperri hjá fólki. Og líkasæla heldur enn fólkaræðislig luttøka og virkishugur verður lagið.

# Høgni má yppa øksl at sær sjálvum

JOHN JOHANNESSEN
Løgtingsmaður
www.john.fo



**Enn einaferð roynir Høgni Hoydal at stigmatisera onnur og gera seg til talsmann fyri tí góða og reina. Hesaferð skal undirritaði hava ábyrgdina av 34.452 drápum í Irak sambært greinini »Akslayppini geva andsperru«. Tey sum kenna málið vita, at Høgni hevur orsøk at yppa øksl at sær sjálvum**

Tað var á fundi í uttanlandsnevnd løgtingsins tann 3. oktober 2002, at Javnaðarflokkurin sum tann einasti flokkurin á løgtingi noktaði fyri, at USA í stríð við viljan hjá ST skuldi brúka føroyskt loftrúm í sambandi við náðileyst álop á Irak.

Fundurin í uttanlandsnevndini var tann fjórði í røðini fyri tingsetuna 2002. Júst hesin fundurin var komin í lag í sambandi við, at táverandi løgmaður, Anfinn Kallsberg, hevði heitt á uttanlandsnevndina um at siga sína hugsan til umbøn frá amerikanska hervaldinum um at fáa loyvi at brúka føroyskt loftrúm í hernaðarligu atgerðunum ímóti Irak. Fundurin varði frá kl. 09.05 til klokkan 10.15. Longu tá fundurin byrjaði var greitt, at Javnaðarflokkurin var einasti flokkur, ið fór at mótmæla nýtslu av føroyskum loftrúmi til slíkt endamál.

Andrias Petersen, sum umboðaði Javnaðarflokkin, førdi soljóðandi í gerðabókina:

"*Ein minniluti, Andrias Petersen, tekur ikki undir við, at loyvið hjá amerikanskum stríðsflogførum verður givið treytaleyst, men mælir til, at málið um álop á Irak fyrst skal roynast í ST høpi*".

**Høgni sat við endan**

Formaður í uttanlandsnevndini um hetta mundið var Hergeir Nielsen umboðandi Tjóðveldisflokkin. Formaður í Tjóðveldisflokkinum var Høgni Hoydal. Varaløgmaður um hetta mundið var Høgni Hoydal og landsstýrismaður fyri suveræniteti, lógarmálum og rættartrygdini hjá tí einstaka um hetta mundið var Høgni Hoydal.

Støðan hjá Hergeiri Nielsen og harvið Tjóðveldisflokkinum til álvarsmálið var ongin. Fólkafloks- løgmaðurin í samgongu við Tjóðveldisflokkin og Miðflokkin mælti til at geva loyvi uttan treytir, og hesum setti Tjóðveldisflokkurin seg ikki ímóti. Hergeir Nielsen førdi í gerðabókina, at hann helt seg ikki kunna taka støðu til málið, meðan Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Miðflokkurin tóku undir við, at USA slapp at nýta føroyskt loftrúm sum teir vildu til hernaðarligar atgerðir.

Hetta hendi í teimum døgum, tá Høgni Hoydal hevði ábyrgdina av suveræniteti og rættartrygd...

**John heldur fast við støðuna**

Støðan hjá Andriasi Petersen í 2002 var ein greið støða. Javnaðarflokkurin virðir endamálið við ST og vil ikki hjálpa ávísum londum at traðka onnur lond ella fólkasløg undir fótum. Júst hesa somu støðuna havi eg hildið fast við í mínum virki í uttanlandsnevndini síðani 2004.

Tí havi eg tvær ferðir formliga gjørt púra greitt, at Føroyar eiga at boða frá, at vit ikki góðtaka, at føroyskt loftrúm verður nýtt til ólógligan flutning av fangum. Somuleiðis havi eg mælt til, at løgmaður tekur stig til at fáa kannað, um ólógligur flutningur av fangum fer fram í føroyskum loftrúmi.

Eg havi ikki, eins og Tjóðveldisflokkurin gjørdi í 2006 og nú aftur í 2007, mælt til fullkomiliga at sýta fyri, at nakað amerikanskt hernaðarflogfar fær loyvi at flúgva yvir Føroyum. Tí hetta er at gera seg inn á ST-samtyktina um endurbygging av Irak og inn á ST-samtyktirnar um felags stríð ímóti yvirgangi. So mikið stór er mín virðing fyri ST, at eg heldur ongar ætlanir havi um at fara at seta meg upp ímóti ST-samtyktum í framtíðini.

**Ypp nú øksl**

Nú havi eg í øllum førum gjørt eina smædna roynd at siga Høgna Hoydal frá um føroyska leiklutin í hesum máli. Vónandi er hann so mikið at sær komin, at skjalprógvini fáa hann at yppa øksl at sær sjálvum og sínum goragangi ímóti tí sindri, sum enn finst av vinstrahallum politikarum í Føroyum. Mín vón hevur leingi verið, at tað fór at bera til hjá vinstravonginum at finna saman til mikið gagn fyri samfelagið. Men tíverri má eg yppa øksl, tá eg síggi hesi, sum siga seg umboða vinstravongin, kasta við runu eftir hvørjum øðrum, meðan tráanin alsamt veksur at sleppa at kasta saman við teimum borgarligu.




# Samfeldi politiski myndugleikin hevur svikið - ikki peningastovnar

JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður í Norðoyggjum



Í Dimmalætting 4. januar hevði Johan Dahl grein hann nevndi: "Hvør og hvat er tað, sum yvirupphitar búskapin", har hann í sínum lagi metir um politikaran, peningastovnar, ábyrgd Búskaparráðsins og hvar og hví so nógv ferð er á okkara búskapi.

Greinin staðfestir, sum rætt er, at rótin og bulurin til yvirupphitingina liggur í høvuðsstaðarøkinum, at politiski ryggurin ella samfeldi hevur svikið heildarbygnaðin, hetta hevur havt við sær, at virðini fyri hvørja fastogn sær eru økt í stórum í høvuðsstaðnum, meðan tey lutfalsliga eru lækkað nógv, longur út í útjaðaran tú kemur.

Hesar staðfestingur eru bæði viðkomandi og rættar.

**Búskaparráðið ynskir kanska sentraliseringina**

Men tá Johan leggur skuldina fyri hesa gongd á peningastovnarnar og á Búskapar-ráðið, so klári eg ikki at fylgja honum longur, hóast eg fari at geva honum rætt í, at Búskaparráðið ikki nóg greitt vísir á í hvørjum geografiskum øki upphitingin serliga er. Antin vil Búskaparráðið sleppa sær undan hesum týdningarmikla parti, ella er tað tí, at teir skorða undir eina sentralisering til høvuðsstaðin av samfelagsvirðum. - Tað er ikki óhugsandi.

Sjálvur setti eg formanninum í Búskaparráðnum spurningin á einum fundi í Klaksvík,

um hví Búskaparráðið ikki gjørdi nakað meiri burtur úr hesum staðfestingum, tá teir vitstu, at yvirupphitingin er í høvuðsstaðnum og bara har. Soleiðis sum eg skilti svarið, komst hetta av, at resourcirnir vóru ikki til tað.

Men lat vera sagt her, Búskaparráðið er ráðgevandi, og vísir á sjúkueyðkennini, meðan politiski myndugleikin hevur stýringina og hevur avgerðirnar um hendur.

**Peningastovar skulu vera tryggar forrætningar**

Ein peningastovnur er til fyri m.a. at umsita peningarenslið í samfelagnum, geva lán av innistandandi peningi, at selja tær vørur teir hava á hillini, keypa og selja fíggjarvirði og leiðslan skal syrgja fyri, at partaeigararnir fáa eitt so gott avkast av ísetta kapitalinum sum gjørligt. Gott er fyri eitt land at hava sterkar peningastovnar.

At virðið á einum sethúsum í t.d. Suðuroy ikki er tað sama, sum í høvuðsstaðnum, er ikki peningastovnsins skuld. At peningastovnarnir ikki lána eins nógvan pening út til eina ogn, sum kann seljast fyri eina mió. í Suðuroy, sum tá hon fer fyri 2 mió. í høvuðsstaðnum er ikki annað enn sjálvsagt. Alt annað er ørðskapur.

Ábyrgdin skal leggjast har hon eigur, tað er á ein sentraliserandi politiskan myndugleika væl stuðlaður av embætisfólki.

**Politikarar og álvari**

At politikarar kropp á kroppi fara at tosa um viðurskifti uttanfyri Havnina, hvørjaferð ein oljutunna á Skúvoynni skal viðgerast á tingsins røðarapalli, uttan at samfeldi politiski myndugleikin tekur tað í álvara, er høvuðsorsøkin til, at samfelagið er so avskeiklað, sum Johan so rætt vísir á.

Lat meg til seinast í hesum umfari nevna, at eg harmist um, at bæði politikarar og fjølmiðlar kriminaliseraðu átakið, tá eg í síni tíð samankallaði politikararnar uttanfyri høvuðsstaðin til at viðgera hóttandi framtíðina og fleiri av politikarunum hoknaðu.

Enn er ikki ov seint at gera nakað. Tað krevur samstarv millum politiska myndugleikan serliga úti um landið. Tástani kann nakað henda.

Tøkk fyri viðkomandi greinina Johan. Neyðugt er við talsterkari samfeladum liði.

(Hetta er fyrsta greinin av fimm um sama evnið)
www.keldu.com
keldu@post.olivant.fo